LM-066/2023

Fylgiskjal 7

Annika Petersen

Fra: Rani Reginsson Johansen
Sendt: 19. oktober 2023 11:08
Til: VMR-Journal
Cc: Birta Biskopstø
Emne: Hoyringssvar frá TAKS til uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg

TAKS hevur hesar viðmerkingar:

1) Har, sum orðingin "skjótast gjørligt" verður brúkt, eigur ein meira ítøkilig tíðarfreist at lýsast fyri at gera orðingina greiða. Hetta kann verða gjørt í viðmerkingunum.

2) Uppskotið eigur at innihalda revsingar ella aðrar avleiðingar fyri brot á 1) árligu skylduna at kanna, um broytingar skulu gerast í skrásettum upplýsingum um veruligar eigarar, og 2) skylduna eftir umbøn at veita felagi upplýsingar um ognarviðurskifti, so at tað kann eyðmerkja veruligu eigarar sínar. Revsingin fyri brot á kanningarskylduna kundi verið avtøka ella sekt. Revsingin fyri brot á upplýsingarskylduna kundi verið sekt. Møguliga eigur tað eisini at hava avleiðingar fyri rættin til vinningsbýti og líknandi hjá teimum, sum eftir umbøn ikki vilja upplýsa um ognarviðurskifti síni, hóast tey hava skyldu til tað.

3) Í mun til vinnufyritøkulógina er tað ein vansi, at viðkomandi ásetingar ikki fevna um øll íognarfeløg ella kommanditfeløg. Her verður hugsað um feløg við ein ella fleiri likamligar eigarar/komplementarar, sbr. § 2, stk. 3, og ásetingarnar í §§ 10-16, herundir serliga §§ 15 g, i og j. Her eigur § 2, stk. 3, í vinnufyritøkulógini at verða broytt.

Vinarliga

Rani R. Johansen
fulltrúi

Lógardeildin
Tel. 352741

TAKS

Postrúm 2151, FO-110 Tórshavn
www.taks.fo, taks@taks.fo, tel 35 26 00

Fyrivarni

Ert tú ikki rætti móttakari av hesum teldubrævi, vinarliga sig mær frá og strika brævið.